## Accord stationcar



Ein heilt nýggjur Honda Accord bleiv sýndur fram á altjóða bilaframsýningini í Paris. Nú hava teir kunngjørt, at hann eisini verður gjørdur sum stationcar. Accord Tourer, ið er 8.5 cm longri enn sedan útgávan, kemur á marknaðin í vár

*Kelda: Motor Magasinet*

## Kia Carens



Kia Carens kemur á marknaðin í januar. Carens er ein mini-MVP ið fæst við fimm ella seks sitiplássum. Hann fæst við 1,8 litur bensinmotori og 2,0 common-rail dieselmotori

*Kelda: Bil Magasinet*

## Nýggjur Astra næsta ár



Um eitt ár kemur ein nýggjur Opel Astra. Bilurin, ið verður nakað størri og rúmligari enn núverandi Astra, skal kappast við bilar sum VW Golf og Peugeot 307.

*Kelda: Bil Magasinet*

# VW Touareg við 313 hk dieselmotori



*Touareg trekkjur á øllum 4 hjólunum, og fríhæddin kann broytast heilar 30 cm*



*Innan er tað sum at ferðast á fyrsta klassa*



*Aftan sær Touareg út sum ein høgur stationvognur*

**Á bilaframsýningini í Paris var ein nýggjur VW Touareg sýndur fram. Talan er um ein stóran luksus "off-roadara" ið fæst við V6 ella V8 bensinmotorum og V10 dieselmotori**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eftir at luksusbilurin VW Phaeton kom á marknaðin, kom ein annar luksusbilur í hølunum á honum. Talan er um VW Touareg, ið er ein stórur luksusbilur, hann er 4,75 cm langur og 1,93 cm breiður. Bilurin trekkjur á øllum 4 hjólunum og hevur eina luftfjaðraskipan har fríhæddin kann broytast heilar 30 cm. Dupultir tetningslistar um hurðarnar tryggja at bilurin uttan trupulleikar kann koyra gjøgnum hálvan metur vatnstøðu, uttan at vatn kemur inn í bilin. Umframt 3.2 litur V6 bensinmotorin við 220 hk, fæst hann eisini við einum 10 syl. 5.0 litur dieselmotori við 313 hk. Seinni kemur ein 2.5 litur dieselmotorur og ein 4.2 litur V8 bensinmotorur. Touareg bleiv alment sýndur fram á bilaframsýningini í Paris og kemur á marknaðin í januar. Í Danmark kemur bilurin at kosta frá 860.000 krónum fyri V6 útgávuna til 1,5 millión fyri V10 útgávuna.

# Samfelagsfundir á Saltsøluni



**Hendan myndin er tikin á eystaru bryggju í Havn í 50-unum. Stóri bygningurin er Saltsølan. Í fleiri ár hevði brøðrasamkoman samfelagsfundir úti á Saltsøluni. Hetta var áðrenn nýgga Ebenezer bleiv varð liðugt fyrst í 60-unum**

GOMUL MYND
*Magnus Gunnarsson*

Bygningurin hjá Saltsøluni á eystaru bryggju var karmur um fleiri samfelagsstevnur hjá brøðrasamkomuni í 50-unum. Gamli salurin, Ebenezer, í miðbýnum, var blivin ov lítil til at hýsa teimum, sum komu úr øllum landinum til hesar fundir. Tá nýggi Ebenezer bleiv liðugur fyrst í 60-unum, vórðu fundirnir hildnir har. Seinnu árini hevur Ítróttarhøllin á Nabb eisini verið brúkt til samfelagsstevnurnar. Á hesi myndini eru fólk á veg út úr Saltsøluni, og bussar hjá Óla Arge eru komnir eftir teimum. Eisini er ein lastbilur og ein Ford Consul persónbilur millum báðar bussarnar. Sum tað sæst, blivu nógvar sildatunnur brúktar hesa tíðina. Sildatunnurnar vórðu bæði innfluttar og gjørdar á Tunnuvirkinum. Bygningurin hjá Saltsøluni bleiv seinni longdur vestureftir.

*Myndin er úr myndasavninum hjá Birgari Johannessen*

# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD ESCORT STATIONCAR**
Árg aug.96, Km 47.000. Bensin.
Kr. 89.000.



**BMW 316I**
Árg des.92, Km 168.000. Bensin.
Kr. 98.000.



**VW PASSAT TDI 115 HK**
Árg aug.99, Km 77.000. Diesel.
Kr. 179.000.



**FORD FIESTA 1,8 DIESEL**
Árg feb.92, Km 144.000. Diesel.
Kr. 55.000.



**FORD MONDEO 1,8I**
Árg nov.2000, Km 28.000. Bensin.
Nýsýnaður. Kr. 148.000.

VW Audi SEAT
Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL HATCHBACK**
Árg Dec. 96, Km 105.000.
Vælhildin í góðum standi.
Kr. 78.000.



**DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR**
Árg Juni.98, Km 29.000. Sera vælhildin. El rútar Fr. Takboylar, Radio við bandspælara, Centrallás, Sleipikrók.Bert km. 9.000. Kr. 96.000.



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 >>DIESEL <<**
Árg okt.95, Km 104.500.
Vælhildin í góðum standi.
Kr. 75.000.



**RENAULT SCENIC 1.6 95 HK**
Árg Nov. 99, Km 45.000. Sera vælhildin 2.El. sóltak- El. rútar-mjørkalyktir- Spoylara aftan-Alufelgur og sleipikrók.
Kr. 148.000.



**FORD MONDEO 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Aug.98, Km 90.000.
vælhildin:Fjarðstýrt centrallás-Aircondition-hiti í setrum-El rútar/spegl v.m. Kr. 135.000.

Pf. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650

LÝSIÐ
við





brúktum
bilum
í Sosialinum




Tekna teg sum haldara, so fært tú Sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 400,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 600,-/ársfj.
☐ Einaferð um vikuna í Europa: 500,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 210,-/ársfj.

Sosialurin